


## Ferðsluóhapp, innbrot og nógv full fólk

Tveir mans vórðu tiknir fyri spirituskoyring í Havn um vikuskiftið. Annar varð tikin í samband við eitt óhapp tíðliga leygarmorgunin, og hin varð tikin í miðbýnum sunnumorgunin. Politiið gjørdi sunnunáttina grein 13 kanning í Hoyvík, har tey fyri fyrstu ferð royndi nøkur nýggj skreening alcometur, har fólk ikki skulu blása í eitt munnstykki, men bara ímóti einum tóli. 30 bilar vórðu steðgaðir, men eingin koyrdi ávirkaður. Leygarmorgunin klokkan fýra varð løgreglan boðsend til eitt innbrot í Kommunuskúlanum í Havn. Fólk vóru skjót á staðnum, og tveir 18 og 19 ára gamlir unglingar vórðu handtiknir. Í Hoyvíkar Skúla vóru seks rútar brotnir í morgun. Politiið sigur, at hetta er ein afturvendandi trupulleiki, og tey vænta at talan er um somu persónar. Harumframt hava hálkuóhapp, bardagar og full fólk sermerkt vikuskifti.



*Frá móttøkuni í Müllers Pakkhúsi fyrrapartin*



# Altjóða jetset í Müllers Pakkhúsi





MÓTI

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Høvuðspersónarnir, Guðrun og Guðrun*

Mótaserfrøðingar, mótablaðfólk og danskir kendissar eru komin til Føroyar á altjóða mótasýning. Dagurin byrjaði í Mullers Pakkhúsi við reseptión, áðrenn leiðin gekk vesturaftur til mótasýning

Gestirnir hjá Guðrun og Guðrun vóru sera hugtiknir av øllum, sum tey sóu og upplivdu. Millum gestirnar vóru fólk frá Japan, Italia, Danmark, Svøríki og Noreg.

- Hetta er framúr hugtakandi, segði ein av gestunum.

- Vanliga standa vit í kø til eitt glas av champagnu, men her fáa vit privatflogfær, sighseeing túr við Guðrun og Guðrun sum guides og nú eina lekra máltíð, segði gesturin í Mullers Pakkhúsi

Fólk virkaðu at vera spent til mótasýningina og serliga harrakollektiónina. Og tey vóru eisini púra samd um, at hetta fór at lata hurðar upp í útlandinum.

Sambært Guðrun Ludvíg hevur kravgangur verið eftir billettum. Fólk niðri hava ringt og spurt, um tey kunnu fáa billet, tí tey hava hoyrt um hetta serliga tiltak, greiðir hon frá.

Ein málningaframsýning var hongd upp við málningum eftir bæði Zachariasi Heinesen, Anker Mortensen og Hansinu Iversen, ímeðan Uni Debess stóð fyri tónleikinum. Matur og drekka varð latin av Hotel Tórshavn, og seinnapartin var mótasýning á flogvøllinum.

Sosialurin hevur størri myndafrásøgn í blaðnum í morgin, og Rás2 og Portalurin fylgja eisini tiltakinum